FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Innanhýsis**
8. mars 2019
Mál: 18/00213-34
(at tilskila í svari)

# Notat

Samskifti seinastu dagarnar millum Eyðun Olsen, stjóra á Vestmanna Fiskavirki og Rógva Reinert, aðalstjóra, um menningarkvotu og gagnnýtslu av svartkjafti á Vestmanna Fiskavirki við ársbyrjan 2019.

Samskift hevur verið um gagnnýtslu av svartkjafti, nú Vestmanna Fiskavirki setur skjøtul á menningarkvotu teirra av svartkjafti.

Stjórin á Vestmanna Fiskavirki (og onnur vinnulívsfólk við honum) hava víst á, at svartkjaftur ber síni eyðkenni við atliti at gagnnýtslu til matna og smærri framleiðslur, samanborið við onnur fiskasløg. Í sambandi við nevndu framleiðslur ber svartkjaftur millum annað hesi eyðkenni:

1. Svartkjafturin má vera sera feskur og kann bert vera hægst 1 døgn gamal ella bert nakrar tímar gamal.
2. Av nevndu grundum (1) kann svartkjaftur bert nýtast seinasta dag á einum túri ella bert úr seinasta hálinum.
3. Veiðan skal helst fara fram á einum øki, ið liggur tætt at Føroyum.
4. Svartkjafturin skal helst vera lutfalsliga stórur.
5. Og samanumtikið kann bert ein lítil prosentpartur av samlaðari veiðu brúkast til matframleiðslu ella smærri nisjuframleiðslur, í øllum førum í byrjanini av einum royndar- og menningarskeiði.

Við grundarlagi í hesum viðurskiftum er bert møguligt hjá Vestmanna Fiskavirki at gagnnýta ein avmarkaðan lut av svartkjaftakvotuni við byrjan av menningarætlanini í 2019. Felagið hevur skrivað út 2.000 tons av kvotuni til eitt reiðarí, og miðað verður eftir at leggja 10% (200 tons) av hesi nøgd beinleiðis í framleiðsluna á virkinum í byrjanini. Leiðslan á Vestmanna Fiskavirki hevur gjørt avtalu við reiðaríið, ið veiðir fiskin, um at virkið kann fáa svartkjaft av kvotuni hjá skipinum seinri í ár, og á tann hátt kann prosentluturin hækka, tað merkir tann parturin av kvotuni, ið verður nýttur til matna, nisju- ella smærri framleiðslur. Í longri tíðarhøpi skal prosentparturin, ið nýttur verður til egna framleiðslu, stigvíst hækka.

Niðurstøða
Vestmanna Fiskavirki byrjar nú at gagnnýta svartkjaftin innan menningarkvotuna. Í byrjanini byggir ætlanin á grundarlagið undir punkt 1-5. Partarnir hava samband hvør við annan og fylgja gongdini.

Rógvi Reinert
aðalstjóri

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo